**10 TING UM** Jólamannin

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



# Ho ho ho

VIT GLEÐA OKKUM TIL AT FÁA VITJAN AV HONUM UM NAKRAR VIKUR, MEN HVØR ER **JÓLAMAÐURIN** Í GRUNDINI. HER ERU NAKRAR UPPLÝSINGAR UM HANN.

**1** Jólamaðurin hevur nógv nøvn kring heimin. Í Usa verður hann róptur Santa Claus, í Svøríki Jultomten, í Noregi Julenissen, í Italia siga tey Babbo Natale og í Týsklandi gongur hann undir navninum Weihnachtsmann.

**2** Søgan um jólamannin byggir lutvíst á søguna um Sankt Nikolaus, sum var ein turkiskur biskoppur, sum gav gávur til fátøk fólk. Men søgan byggir eisini á heidna søgn.

**3** Í 1931 gjørdi Coca Cola eina lýsing við jólamanninum, har hann var í reyðum og hvítum klæðum. Hetta var ikki fyrstu ferð, at búnin hjá jólamanninum sá soleiðis út, men eftir hesa lýsing gjørdust litirnir standard kring allan heimin.

**4** Tað verður sagt, at jólmaðurin hevur nógvar smáar nissur, sum hann kann senda ørindi fyri seg, tí hann kann ikki verða allastaðni jólaaftan.

**5** Jólamaðurin er prúður maður, og orsøkin til tað skal verða, at honum dámar so væl at eta gott, og tá fólk seta góðgæti og annað fram til hansara, kann hann ikki lata verða við at fáa sær.

**6** Tað hevur verið tosað nógv um, hvar jólamaðurin býr, og kapping hevur verið millum ymisk øki. Sagt hevur verið, at jólamaðurin býr á Norðpólinum, Finnandi, Ruslandi, Turkalandi og í Grønlandi.

**7** Tað eru eitt sindur av muni, nær jólamaðurin kemur við sínum gávum í ymiskum londum. Summi brúka eisini at hanga hosu upp fyri jól, sum jólamaður so letur okkurt gott í.

**8** Jólamaðurin er ikki vælkomin í øllum londum. Í fjør varð jólamaðurin til dømis bannaður í skúlum í Sarajevo í Bosnia, tí har halda tey ikki, at jólamaðurin skal spæla nakran leiklut í teirra jólahaldi.

**9** **Jeremy Seal skrivar í eini bók um jólamannin, at tað var í 1800-talinum, at jólamaðurin av álvara gjørdist eitt kommersielt umboð.**

**10** Um tú kundi hugsað tær at skriva til jólamannin, so kanst tú gera tað á hesari adressu:
Jólamaðurin, Box 1615, 3900 Nuuk, Grønland.
Sjálvboðin fólk syrgja fyri, at øll, sum skriva til jólamannin, fáa svar frá honum.

## SITAT



Eg vil goyma jólini í mínum hjarta og royna at hava tey við mær alt árið.

***Charles Dickens***
*enskur rithøvundur*

## MIÐLARNIR OG EG



Í nýggja táttinum siga kendir og ókendir persónar frá síni miðlanýtslu.

**MARNA JACOBSEN**, RITSTJÓRI Á BÓKADEILDINI LURTAR EFTIR ROLLING STONES OG HYGGUR EFTIR ABSOLUTELY FABOLOUS.

**MÍTT BLAÐ**
Information á netinum og *New York Times* á telefonini.

**MÍN HEIMASÍÐA**
Eg brúki heimasíður serliga sum part av arbeiðinum. *www.bfl.fo* dagføri eg, so har eri eg hvønn dag, umframt *sprotin.fo* og onkuntíð *politiken.dk*



**MÍN TÓNLEIKUR**
*Rolling Stones* er altíð gott, men annars dámar mær ógvuliga ymiskan tónleik.

**MÍTT SOSIALA NETVERK**
*Facebook*, *Twitter* og mín bloggur: *marnakj.wordpress.com*




**MÍN DVD**
Six Feet Under.

**MÍTT MAGASIN**
*Kvinder Køn og Forskning*. Eg fylgi við í tí, sum hevur við javnstøðu at gera.

**MÍN SJÓNVARPSRØÐ**
*Absolutely Fabolous*, tí tær minna meg um meg sjálva – ein 70'ari alt lívið.

**MÍN BÓK**
Í løtuni lesi eg *Revolvertricket* hjá Louise Welsh. Mær dámar ótrúliga væl krimi, men tað skal vera væl skrivað.

**MÍTT ÚTVARP**
Lurti næstan ikki eftir útvarpi, bara í bilinum á veg til arbeiðis.

**MÍN TELEFON**
*IPhone* – spøl, bøkur, tónleikur, orðabók, vegvísari, kókibók, fetteljari og you name it – tað kann ikki blíva betri!



**HVAT VIL TÚ IKKI BRÚKA TÍÐ UPPÁ?**
*Lindina*, tí hon er oyðileggjandi.

**HVAT IRRITERAR TEG Í MIÐLUNUM?**
At fólk gera sær so lítlan ómak. Grunnan og innetnan journalistikk,

**HVAT VIL TÚ HAVA MEIRI AV Í MIÐLUNUM?**
Meira tilfar um bøkur og film. Meira til børn og ung.

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Tórnroos